# Fundur í Hvalbiar sóknar kommunu hin 18. mai 2015

Møttir vóru: Rúni Thomsen, Magni Bertholdsen, Eyðfinn Debes, Martin í Nesi, Niels J. Thomsen, Jóhan Eli Poulsen og Niels Pauli Hammer. Trúgvi Gudmundarson var burturstaddur.
Formaðurin bað um loyvi at taka eitt mál við aftrat – hetta varð játtað og kemur á skránna sum mál nr. 9.

Fundurin varð settur kl. 18.30.

1. **Umsókn um stuðul til venjingarlegu í Spania frá Susvim.**
   Samtykt varð einmælt ikki at stuðla hesum.

2. **Umsókn um stuðul til "Summartónar 2015".**
   Skipað verður fyri framførslum kring landið í sambandi við tiltakið "Summartónar 2015". Samtykt varð einmælt ikki at stuðla.

3. **Umsókn um fíggjarligan stuðul frá Føroyingafelagnum í Aalborg.**
   Søkt verður um stuðul til at betra um og framhaldandi menna virksemið í felagnum. Samtykt varð einmælt ikki at stuðla.

4. **Umsókn frá bygdarfelagnum á Rananum um loyvi til túnadans í Sandvík.**
   Samtykt varð at geva loyvi at hava túnadans.

5. **Skriv frá bygdarfelagnum á Rananum viðv. gøtu/vegi oman móti Ranhøll.**
   Heitt verður á bygdarráðið um at gera gøtuna, sum gongur frá landsvegnum oman til Ranhøll framvið gomlu krambúðini aftur. Samtykt varð at gera gøtuna aftur, soleiðis at gangast kann eftir henni, tó ikki soleiðis at bilar kunnu koyra eftir henni.

6. **Skriv frá borgara viðv. bygdagøtuni Hvalba/Tvøroyri.**
   Samtykt varð at heita á hagastýrið fyri Rókhaga at skipa fyri, at gøtan verður umvæld og játta kr. 15.000,- til hetta.

7. **Skriv vegna nevndina fyri filmin um kolasøguna um nøvn á gomlu kolaminunum í Hvalba.**
   Nevndin heitir á kommununa um at virka fyri og stuðla uppsetan av einum navnaskelti við hvørja kolaminuna. Samtykt varð, at Trivnaðarnevndin tekur málið upp.

**8. Skriv frá Kommunufelagnum viðv. broytingum í kunngerð um fíggjarligt frípláss**.

Viðvíkjandi møguligum broytingum í kunngerð nr. 88 frá 17. juni 2009 um fíggjarligt frípláss, hava Kommunufelagið og Almannamálaráðið umrøtt málið. Intervallið liggur í dag millum kr. 247.900 og kr. 292.900. Samtykt varð at boða frá, at Hvalbiar Kommuna tekur ikki undir við at hækka markið.

**9. Skriv viðv. grundøki á Snæbjarnarvegi, Hvalba.**

Í sambandi við fyrispurning uppá grundøki, har møgulig umsókn kemur um byggiloyvi til hús á 60-80 m2, varð samtykt at siga frá, at Hvalbiar Kommuna ikki sær nakra forðing fyri at geva byggiloyvi til hetta.

Fundarbókin lisin og skrivað undir.          Fundur lokin kl. 20.45

Rúni Thomsen          Magni Bertholdsen          Eyðfinn Debes          Martin í Nesi

Niels Jacob Thomsen          Jóhan Eli Poulsen          Niels Pauli Hammer